# 3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

Dagfinn Olsen

## Crowded House



### Afterglow

Longu á fløguhúsanum verður gjørt vart við, at her er ein fløga við savni av rárum og ikki áður útgivnum løgum hjá Crowded House.

Í húsanum greiða teir frá, at tað er iki lætt hjá einum bólki at hyggja aftur á gomlu síðurnar. Tað er stoltleiki og kanska eisii bilsni ella hetta við at rodna. Júst sum tá fólk hyggja í eftir gomlum myndum.

Men Hetta er einn bólkur, ið ongantíð gav út alt, ið teir spældu inn. Nú eru teir savnaðir aftur á fløguni, eftir at teir fóru hvør til sítt í 1996. Ein góð og áhugaverd fløga, sum tey, ið kenna væl Crowded House, mugu eiga. Ein týdningarmikil fløga í savninum hjá teimum, ið kalla seg Crowded House fan.

Sum teir siga í fløguhúsanum: Crowded House has left the building.

## Henning Stærk




### Hit House

Henning Stærk er eitt av góðu, gomlu og sterku nøvnunum í donskum rock- og bluestónleiki. Ein maður, ið hevur røtur og sum var har, tá tað hendi, Tá píkatráðstónleikurin tók seg upp í Danmark.

Aftur er hann á marknaðinum við fløgu, har hann hevur savnað góð og kend løg, ið hava røtur í rock- bluestónleiki.

Erik Kramshøj hevur forvitnisligan inngang í fløguhúsanum, har hann m.a. greiðir frá, at Henning Stærk sum ungur spældi í The Poisons, sum vann Danmarksmeistaraskapin í píkatráðstónleiki, men tó komu tier ikki til Keypmannahavnar og Hit House at leika. Tann dreymurin gekk ongantíð út hjá Henning Stærk og tað er hetta, sum heitið á fløguni sipar til.

Síðani Henning Stærk í 1980 stovnaði egnan bólk, hevur hann verið frammaliga í donskum tónleiki. Hann er ektaður "rockari" og tað hoyrist og merkist, tá ein fløga við Henning Stærk verður sett í spælaran.

Fleiri kend løg eru á fløguni. Ike Turner lagið I can't believe what you say cause I see what you do. Eisini lagið hjá Ole Bredal (Sir Henry) Let's Go er við og kenda lagið hjá Curtis Mayfield People get ready.

## Telling Stories




### Tracy Chapman

Nýggj fløga frá Tracy Chapman, nú vit eru komin inn í ár 2000.

Tað er nógv vatn runnið, síðani Tarcy kom fram einaferð í áttatiárunum. Hon var øðrvísi og stílurin eyðkendur. Ein sermerkt sangarinna við guitara.

Og stílurin og ljóðið er ikkii stórt øðrvísi nú í ár 2000, enn tá. Tað er okkurt ærligt og harvið ódeyðiligt við Tracy Chapman og hennara tónleiki. Tað er eisini prógvað, við at eitt av hennara eldri løgum gjørdist eitt hitt við nýggjari bólki fyri kortum.

Telling Stories er ein fløga í rætta Chapman stílinum. Góð løg og stílurin er hin sami og eyðkendi.

Tracy hevur góðar tónleikarar afturat sær, men spælir eisini sjálv ymisk ljóðføri. Umframt at syngja og leika guitar, sum viti vita at hon dugir.

Gestur á fløguni er sangarinnan Emmylou Harris, sum eisini fær serstaka tøkk í fløguhúsanum.

Tað kann staðfest at,at Tracy Chapman er við enn, eini 15 ár eftir, at hon kom fram. Og hon sigur søgurnar líka væl enn, sum áður. Kanka betri. Tað prógvar Telling Stories.



# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Hava tit eini boð til ÍtróttaSosialin, ella vita tit møguliga um eina søgu, sum kundi verið áhugaverd at skriva um, kunnu tit altíð seta tykkum í samband við okkum á tlf. 311820 ella við at senda teldubræv til: jakup@sosiaurin.fo

## Tað fløðir í kassanum hjá FSF

*Tað eru serliga inntøkurnar frá UEFA og FIFA sum gera, at fíggjarligu vánirnar hjá FSF tykjast síggja bjartar út*



*Skal metast eftir seinasta ársroknskapinum hjá Fótbóltssambandinum, eru enn fleiri seðlar á veg niður í kassan*
***Myndaviðgerð: Álvur Haraldsen***

Í níti árunum reið fíggjarliga fleiri ferðir um snarið hjá Fótbóltssambandinum. Men sambært roknskapinum fyri 1999, sum varð lagdur fyri og samtyktur av aðalfundinum leygardagin, og sambært gongdini, sum roknað verður við í ár, so sær tað út til, at tað fer at bera til rættuliga at kjølfesta eginognina, sum hevur verið so slunkin, at raksturin hevur verið tryggjaður í sjónvarpsavtaluni við UFA.

At tað stendur væl til í kassanum hjá FSF kemst ikki av størri inntøkum heima á landi, men heldur av, at altjóði limaskapurin og altjóða virksemið hjá landsliðnum og feløgunum hevur við sær, at inntøkurnar eru øktar rættuliga nógv.

### Gongdin

Rakstrarroknskapurin í fjør vísti eitt yvirskot upp á 1,59 milliónir krónur. Hetta er væl minni, enn tað, sum roknað varð við, men tað kemst av, at FSF hevur gjørt av, at veitingin frá UEFA í sambandi við EM–2000 kappingina skal inntøkuførast fyri ár 2000 og ikki fyri ár 1999, sum tað varð roknað við, tá fíggjarætlanin fyri 1999 varð løgd.

Fíggjarætlanin fyri 1999 roknaði við einum yvirskoti uppá 4.498.700 krónur. At gongdin var øðrvísi, enn roknað varð við, kemst av einari meirinntøku frá UEFA upp á 2,1 millión krónur og so av omanfyri nevndu útseting av inntøkuskráseting.

Útreiðslurnar vórðu mest ávirkaðar av, at stuðulinum frá FSF og til Tórsvøll upp á 1,5 milliónir krónur, og so av tí, at inntøkurnar av landsdystunum á heimavølli royndust verri, enn roknað varð við. Á Svangaskarði var avlopið umleið 200 túsund krónur minni, enn roknað varð við, og á Tórsvølli varð avlopið umleið 800 túsund krónur minni, enn tað varð roknað við.

UFA hevur í sjónvarpsavtaluni við FSF bundið seg til at gjalda ávísar upphæddir til FSF, sjálvt um inntøkurnar av sjónvarpingini ikki eru stórar. Hetta hevur havt við sær, at skuldin hjá FSF til UFA nú er 1,7 milliónir krónur. Nettoskuldin til Føroya Sparikassa og onnur er umleið 200 túsund krónur.

FSF eigur 652 túsund krónur til góða hjá UEFA, og av veddingarpengunum úr Danmark eigur FSF 931 túsund krónur til góða. FSF hevur lænt grunninum Tórsvølli 4,0 milliónir krónur.

### Framtíðin

Tá Torleif Sigurðsson, formaður í FSF, legði ársfrágreiðingina fyri aðalfundin leygardagin, segði hann soleiðis um fíggjarligu vánirnar:

– Við avlopinum í 1999 upp á 1,585 milliónir krónur er eginognin hjá FSF 1,654 milliónir krónur. Í ár 2000 verður afturberingin frá UEFA til FSF í sambandi við EM–2000 inntøkuførd. Hon er 2,2 milliónir krónur. Saman við mettu inntøkuni frá NM fyri a–landslið kann roknast við, at avlopið fyri ár 2000 verður umleið 3 milliónir krónur.

Um aðrar inntøkur segði Torleif Sigurðsson soleiðis:

– Í sambandi við at europeiska meistarakappingin er víðkað at fevna um 32 lið rokna vit við einari hækking í tillutaðu upphæddini upp á 450 túsund krónur um árið. Afturberingin fá UEFA í sambandi við EM rokna vit við fer at verða, sum hon hevur verið. Tað vil siga 2,2 milliónir krónur yvir fýra ár.

– FIFA hevur gjørt av, at øllum limalondunum í FIFA skulu tillutast ein millión dollarar fjórða hvørt ár. Í 1999 fekk FSF fyrsta gjaldið upp á 1,7 milliónir krónur. Hesin peningur er játtaður soleiðis, at limalondini skulu søkja FIFA um peningin, og tað skal undirbyggjast, hvat peningurin verður brúktur til.

Býtislykilin í sambandi við veddinarpengarnar úr Danmark er skrúvaður soleiðis saman, at FSF fær tólv av sjeyti pørtum. FSF hevur mett upphæddina fara at verða 400 túsund krónur um árið.

JH

## Henning og Pól til Íslands

*Landsliðsleikararnir skulu í eina góða viku venja við Váli í Reykjavík, sum komandi ár skal spæla í næstfremstu íslendsku deildini*

Tað er møguleiki fyri, at tveir landsliðsspælarar afturat fara at spæla fótbólt í Íslandi í summar. Henning Jarnskor og Pól Thorsteinsson fara fríggjadagin til Íslands, har teir í eina góðu viku skulu venja við Váli í Reykjavík. Um Válur verður áhugað í at knýta spælararnar til sín, og um semja annars fæst um treytirnar, so er møguleiki fyri at hesir báðir fjøltáttaðu landsliðsspælararnir heilt skjótt flyta til Reykjavíkar.

- Válur hevur sett seg í samband við Jákup í Stórustovu, og tað er hann, sum hevur fingið í lag, at vit skulu til Vál at venja. Sum eg havi skilt tað, so skulu vit vera har yviri í tvey vikuskifti, og eg rokni við, at vit umframt at venja eisini fara at spæla við í onkrum venjingardysti.

Hetta sigur Henning Jarnskor. Síðsta summar var hann ein túr í Íslandi. Tá var hann í ferðalagi við systirsoninum, Súna Olsen. Teir vandu við felagnum hjá Allani Mørkøre, ÍBV, í Vestmannaoyggjunum, men ta ferðina spurdist eingin sáttmáli burtur úr.

### Nýggjar avbjóðingar

Henning Jarnskor er 27 ára gamla. Hann hevur verið á besta liðnum hjá GÍ. Vit venja nógv, og vit hava ein góðan venjara, men tá tú hevur verið í sama fótbóltsumhvørvi í so mong ár, so hevði tað ivaleyst verið gott fyri fótbóltsspælið hjá mær at roynt okkurt annað.

Pól Thorsteinsson er 26 ára gamal. Burtursæð frá onkrum skifti, tá hann var í Danmark, so hevði hann altíð spælt við VB, tá hann í 1998 flutti til B36. Fyri stuttum gjørdi vágbingurin í høvuðsstaðnum av, at í ár skuldi hann spæla fótbólt í barndómsfelagnum í Vági. Nú er møguleiki fyri, at tað verðu í Váli í Reykjavík, at Pól Thorsteinsson fer at spæla.

### Nýtt lið

Setningurin hjá Váli í Reykjavík verður í ár at endurvinna plássið í bestu deildini. Tað var ein stórur skelkur fyri válsmenn, tá teir í fjør fluttu niður úr bestu deildini, tí fram til seinasta heyst, var Válur einasta felagið í Íslandi, sum altíð hevði spælt í bestu deildini.

Í ár hevur felagið ein jugoslaviskan venjara. Hann hevur tveir eystureuropearar í hópinum, meðan hinir leikararnir allir eru íslendingar. Talan er um ungt fólk, og nú vilja teir so kannað, um tað fer at bera til at fáa tveir føroyingar við drúgvum altjóða royndum at hjálpa sær. Pól Thorsteinsson hevur síðani 1997 spælt 19 landsdystir, og Henning Jarnskor hevur síðani 1994 verið 33 ferðir á landsliðnum.

JH




*Henning Jarnskor fer saman við Pól Thorsteinssyni til Íslands at royndarvenjar seinni í vikuni*